

*Prentsmiðjan hjá Dimmalætting í 1928. F.v. eru Andreas Rubeksen, Oluf Nielsen og Esben Vangsen*

partaeigarar út, so hann kom eiga 51% av partapeninginum og harvið ræðið á Dimmalætting.

## Tann fyrsti Samuelsen á Dimmalætting

Hetta sást skjótt aftur á Dimmalæting við Georg Lindenskov Samuelsen, sum var sonur Andrass og konu hansara Beatu, sum var dóttir Margrethu og Georg Lindenskov í Havn.

Georg var føddur fyri júst 100 árum síðan tann 8. januar 1910. Hann hevur verið nakað vesaligur sum nýføðingur, tí hann varð heimadoyptur. Hetta varð vanliga gjørt við børn, sum vóru í lívsvanda. Hetta kundi gerast uttan prest, bert tann sum doypti sjálvur var doyptur og trý vitni vóru til staðar.

Men Georg kom seg skjótt. Hann verður so "ordiligа" doyptur í Havnar kirkju, tá ið hann var eitt ár gamal. Ein gubbi hansara var tann blaðungi Guttorm R. Joensen, sonur Amaliu f. Müller og Grønlands Johan.

Her vóru nógvir góðir gestir. Ein av teimum var skyldmaður Georg, Poli í Dal, sum árið eftir gekk burtur við Oliviu. Hann var í barsil, hóast hann var oddamaður í teirri tá uppá seg nýggju brøðrasamkomuni.

14 ára gamal fer Georg á Dimmalætting at læra til prentara. Tá vóru aðrar greiðir enn nú. Tað hevur verið sagt, at eitt tað fyrsta jobbið hjá Georg var at vinda kastið til pressuna, sum tá gekk við handamegi. Blaðið var fýra síður og máttі koyrast tvær ferðir gjøgnum pressuna.

Men í 1936 verður Georg blaðstjóri, bert 26 ára gamal. Hetta arbeiðið hevði hann í fram til 1981, ella 45 ár. Hann mundi eisini aftaná tað taka eina hond í. Tískil kom hann at uppliva alla menning í prentlistini sum hevur verið. Ikki minst kollveltandu var broytingin hann upplivdi vera við seting. Fyrst Georg mintist varð hvør bókstavur settur við hond, og skuldi hann leggast aftur í sama pláss, tá liðugt var at prenta. Seinni fingust setimaskinur, og nú er einki sum eitur setari longur.

Hvørt ark skuldi leggjast í pressuna við hond. Síðan skuldu blaðið falsast. Nú hendir alt hetta automatiskt.

Georg mundi ongantíð gevast at skriva í sínum hugaheimi. Eg hitti hann einaferð langt eftir, at hann var givin við øllum og segði við hann: "Ja, nú er liðugt við at skriva!" Hann hyggur uppá meg og sigur: "So, tú er givin!"

## Mátti velja millum pápan og flokkin

Georg livdi fult út upp til setningin hjá pápanum at varðveita Dimmalætting sum eitt sambandsblað.



*Poul Niclasen var ein dugnaligur blaðstjóri á Dimmalætting 1918-1936*



*Eftir Poul kom Georg L. Samuelsen, sum var blaðstjóri í 45 ár*



*Andrass Samuerlsen vildi tryggja sær, at Dimmalætting gjørdist eitt sambandsblað*